## Drotning Elisabeth er online

Bretska drotningin er 81 ára gomul, men meðan fleiri av hennara javnaladrum ræðast nýggjastu tøknina, so er bretska dronningin eitt nú sera glað fyri sín iPod, ið hon brúkar, tá hon gongur túr. Eisini hevur drotningin teldubústað, og hóast hon ikki sjálv skrivar teldubrøvini, so dikterar hon í heilum teldubrøv, ið verða send til eitt nú ommusynirnar, skrivar BT.



## Lýsingar fáa børn at eta

Ein ensk kanning vísir, at børn, ið hava sæð sjónvarpslýsingar fyri ósunnan mat, beint áðrenn máltíðina, eta upp til 134% meira, enn tey annars høvdu gjørt, eisini leggja tey seg meira eftir ósunnum rættum. Kanningin hevur fingið serfrøðingar til at heita á myndugleikarnar um, at seta forboð móti sjónvarpslýsingum fyri ósunnan mat. Hetta í roynd at koma stóru trupulleikunum við fiti millum børn og ung til lívs, skrivar urban.



# GN OG KÆTI



tann savnaða ljóðmyndin fullari og ríkari.

### Hvat er góður dansur?

Ein kann í hesum sambandi spyrja, hvat tað er, sum skapar "góðan dans". Og aftur er svarið, at tað ikki er ein avgjørd fyritreyt, at øll duga hvørt ørindi, og at dansurin er út í æsir taktfastur. Hetta kann vera sannførandi, men nýtist ikki at vera tað. Hinvegin hevur tað týdning, at skiparin er í einum "nærumhvørvi", sum veitir honum ella henni stuðul og undirtøku, og sum, á gævustund, skapar tað serliga slagið av dialogi og sínámillum fatan, sum fær dansin at rísa og nærkast tí gátuført sublima. Og tess meira ein dansiringur hevur av slíkum "oyggjum", har samrøðan millum nøkur fær støðið at hækka, meira flog kemur yvir heildina.

Dansur er ikki ein marknaðarvøra, eins og eitt nú ein bók, ein málningur ella ein vanlig fløga. Á ein hátt eru fólk sum dansa, og har serstakliga skiparin, gevarar, fólk sum lata av síni yvirflóð uttan at taka nakað afturfyri. Av somu orsøk kann ein DVD sum henda illa vera undirløgd tí ummælishevd, sum annars er tengd at allari marknaðarlist. Hetta áleggur einum ummælara at halda seg til ta meira almennu viðmerkingina.

### Dansur krevur røkt

Dansurin á hesum fløgum er góður, kvøðingin somuleiðis, men í onkrum føri átti undirtøkan at verið betri. Hinvegin hendir tað seg meira enn so, at áskoðarin kennir seg orna niður eftir bakinum. Hetta ber vitnisburð um góðsku. Ein varnast, í De røvere tolv, at skiparin ikki hevur tann stutta steðg millum fyrstu og aðru reglu í niðurlagnum, sum stundum er at hoyra. Hetta er eftir mínum tykki ein fyrimunur.

Mangt rennur einum í huga, sum setir seg við hesum upptøkum. Føroyskur dansur er ein demokratisk mentan. Hon er ikki framførsla fyri áskoðarum, men ein list, sum er atgongd fyri øllum, og har øll eru vælkomin at vera við. Og kortini, eingin kemur sovandi til hesa list, hon setir, sum alt vælgjørt verk, krøv um áhuga, venjing og røkt. Frá mínum ungdómi minnist eg, at dansur var uppaling, tú lærdi ár eftir ár betur, hvussu eitt kvæði fekst undir fótin, at halda lætt í hondina á teimum, tú dansaði ímillum, at geva gongd og lag í dansinum gætur.

### Vonved og Tolkien

Partur av hesi uppaling var at lesa uppá. Hvørt kvæði og hvør vísa er eitt heilt univers, meira kunnugur tú ert við hetta søguunivers, størri verður njótingin. Gátusamrøðan í Sven Vonved er merkilig og hugtakandi og fær ein at hugsa um ein dyst av sama slag millum Bilbo og Golla í Hobbanum eftir J.R.R. Tolkien. Í Kong Sverke verða vit førd heilt aftur til bardagan við Lena í 1210, tá Hvide-stórmenninir royndu at hjálpa Sverker at fáa valdið aftur í Svøríki. Her síggja vit, sambært summum á fyrsta sinni, litirnar í tí svenska flagginum:

*Først drog ungen Engelbret*
*og så han herre Karl Grå;*
*så kom han unge kong Sverke selv,*
*hans banner var gul og blå.*

Tað tykist greitt, at upptøkurnar á hesi útgávu eru gjørdar av royndum fólki. Upptøkutólið savnar seg, við kvæðisins byrjan, um skiparan, reikar so runt í dansiringinum, skoðar stundum heildina, stundum brot, nærkast so aftur skiparanum og hansara umhvørvi. Teir, sum taka upp, hava eyguni eftir, hvussu dansurin gongur, og tað hendir seg meira enn so, at teir megna at vera á rætta stað á røttu tíð, at fanga gævustundina. Upptøkuarbeiði er krevjandi og fatar um fleiri tøknilig parametur, so ivaleyst er hetta lættari sagt enn gjørt.

Tað kann annars kanska vera ómakin vert, tá ið ein setir seg við hesi fløgu, at gloyma tað, ein fyrr hevur lært og hoyrt, og líkasum lata seg uppliva dansin sum nýggjan, sum eitt fyribrigdi, ein fyrstu ferð sær og hoyrir. Tá verður einum greitt, hvussu vakur føroyskur dansur er. Ikki bara tey einstøku ørindini, men eisini eitt nú bara niðurløgini – lati meg sova á tínum armi, ríka jomfrúa ella sólin skínur so fagurliga, komið er hægst á summarið – eru í grundini poesiur, yrkingar.

### Dansur er lekidómur

Og løgini hava yvir sær nakað ævinligt, eina fynd, eina einfeldi og onkra bæði dragandi og tíðarleysa melankoli, sum bara fá tónaskald megna at skapa. Í øllum kvæðum eru frásagnir ella samrøður, tú heldur teg kenna aftur, ella ørindir, sum eru endurtøkur, men allastaðni eru, innímillum, lýriskar perlur og fyndugar máliskur:

*Har vóru hurðar av hókumtræ,*
*málar við ídningshorni,*
*glógvar so gull í gøtum har,*
*sum ljómir av havrakorni.*

Ein varnast eisini nakað annað. Dansurin hevur yvir sær nakað sosialt, sum bæði stendur í andsøgn til nútíðar køldu og armóðsligu einstaklingsdyrkan, og sum samstundis tykist ómetaliga viðkomandi. Dansur er, um hugsað verður um stev og musikk, endurtøka, men tann sum heldur, at við tí er alt sagt,